tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Sjúkur politikkur

Oddagrein

SEINASTU hendingarnar á Landssjúkrahúsinum, har uppsagnir flúgva um oyrini á starvsfólkunum, eiga at fáa politikarar, fakfólk og brúkaran av heilsuøkinum at steðga á og seta sær spurningin: hvat vilja vit við sjúkrahúsverkinum? Tað er sjálvandi rætt at húsast væl við teimum pengum, ið samfelagið hevur tøkar til tey ymsu endamálini. Kanst tú spara nakað við rationaliseringum, so eigur tú sjálvandi at gera tað. Hevur tú dupultfunktiónir, so eigur tú at leggja tingini betri til rættis. Tað, sum vit uppliva, og hava gjørt tað ár eftir ár, er, at sparingar verða ikki gjørdar út frá einum rationaliseringsprinsippi aleina. Tær verða í stóran mun gjørdar sum ein avleiðing av vánaligari politiskari stýring og tilrættalegging og av tørvandi dirvi og hegni hjá at síggja veruleikan í eyguni.

VIT hava í seinastuni verið eygleiðarar til eina frustratión millum starvsfólk á øllum trimum sjúkrahúsunum. Politikararnir og her landsstýrisflokkarnir hava gjørt av at skerja játtanirnar til sjúkrahúsini ella sýta fyri at hækka somu játtanir. Tað vísir seg síðani, at tann, ið rópar harðast afturímóti, hann fær síni krøv ígjøgnum. Tað er einki dulsmál, at norðingar, tað veri seg politikarar ella starvsfólk á sjúkrahúsinum, hava gjørt eitt ótrúligt arbeiði fyri at varðveita og útbyggja sjúkrahúsið alt tað vit minnast. Hetta er ein ærlig søk, tí tað snýr seg jú eisini um teirra arbeiðspláss. Hvør vil ikki verja sítt arbeiðspláss! Vanlagnan hjá Landssjúkrahúsinum, sum enn einaferð verður tveitt út í oyðileggjandi sparingar, er nettupp tann sannroynd, at tað liggur í høvuðsstaðnum. Ikki tí, her skuldu verið nokk av politikarum til at gjørt manngarð um sjúkrahúsið. Men tað er bara sum um, at Landssjúkrahúsið hevur ongan góðan, tá avtornar.

HVØRJA ferð lagt verður upp til at taka eitt breitt orðaskifti um sjúkrahúspolitikkin, so verður mint á samtykt, sum sigur, at vit skulu hava trý vælvirkandi og nútímans sjúkrahús. Og tað er henda samtykt, sum í veruleikin er orsøkin til, at vit ongantíð fáa eitt nóg væl virkandi høvuðssjúkrahús. Tí játtanir til heilsuverkið eru avmarkaðar, og hesar skulu m.a. býtast bróðurliga millum trý - 3 - sjúkrahús. Hetta er ikki eitt álop á smærri sjúkrahúsini, men er tað ein politiskur setningur hjá hesum landsstýrinum ikki at játta sjúkrahúsunum tað tey hava tørv á - og tað samtíðis er eitt krav, at vit skulu hava trý vælvirkandi sjúkrahús, ja hevur tað eitt forklæringsproblem. Avleiðingarnar vit eru vitni til eru í hvussu er nakað annað, nevniliga at vit hava eitt ambuterað Landssjúkrahús. Kanska er avgerðin hjá leiðsluni á LS ikki so óskiljandi kortini, hóast mannagongdin kundi verið ein onnur, tí hon er ein beinleiðis avleiðing av tí politikki, sum okkara politikarar hava sett út í kortið. Kanska adressan als ikki er sjúkrahúsleiðslan, tá vit skulu finnast at uppsøgnunum. Liggur høvuðsábyrgdin ikki hjá ráðharranum og politikarunum, nú tvíhildið verður um, at samlaða og avmarkaða játtanin til sjúkrahúsøkið skal býtast millum trý sjúkrahús! Úrslitið av hesi skeivu gongd verður í síðsta júst tað øvugta av tí politikararnir ynskja. Nevniliga, at einki av sjúkrahúsinum fungerar sum tað skal, og at fleiri og fleiri sjúklingar tí fara at verða sendir av landinum fyri stóran kostnað, peningaliga og menniskjansliga. Nær tora politikarar at tosa opið og ærligt um sjúkrahúspolitikkin uttan at lata seg stýra av atkvøðum í einum og øllum teir gera? Eru politikarar ikki eisini valdir til tess at sannføra sínar veljarar um, hvat er best fyri alt fólkið her býr og ikki bert fyri sítt valdømi?

Sosialurin

Viðmerking:

Sambandsflokkurin fór í baklás fyri skjótt 100 árum síðani

Eitt aftursvar til ósakligu og ósonnu viðmerkingarnar frá Edmundi Joensen

Politikkur er á ein álitisskapandi hátt at føra floksins sjónarmið fram og at royna at ávirka gongdina, so langt sum tað ber til. Hetta verður sjálvsagt gjørt uttan mun til, um ein situr á andstøðu ella í samgongu, og hetta verður gjørt uttan mun til, hvørji mál eru á politisku dagsskránni.

Soleiðis hevur Javnaðarflokkurin altíð skilt sína uppgávu í føroyskum polikki, meðan einstakir aðrir flokkar meira hava lagt seg eftir at lofta ónøgdini.

Tá tað snýr seg um ríkisrættarligu viðurskifti okkara, so hendi tað fyri skjótt 100 árum síðan, at Sambandsflokkurin fór í baklás og hevur verið tað síðani. Á ein næstan fundamentalistiskan hátt hevur hesin flokkur gjørgnum allar tíðir noktað fyri at umrøða spurningin, tí hann stutt og greitt ræðist hann. Úrslitið av hesari fastlæstu støðu Sambandsfloksins hevur verið, at tað er eingin flokkur í føroyskum politikki, sum hevur lagt so nógv brenni til loysingarbálið sum júst Sambandsflokkurin.

Eru flokkar slopnir burtur úr samgongufjøtrunum við Sambandsflokkin, so hevur sjálvstýrisrákið altíð fingið størri ferð, enn fleiri halda ráðiligt, meðan hevur Sambandsflokkurin verið í samgongu, so hevur tað verið strangliga bannað bara at taka málið upp á tungu.

Mangt bendir á, at leiðsla Sambandsfloksins nú raknar við og sær, at ongin tímir at brúka tíð og orku til at kjakast sjálvstýrismál við teir, og at Javnaðarflokkurin enn einaferð av øðrum flokkum verður hildin at vera meira áhugaverdur. Drignir eftir hárinum, tí heimurin er farin undan teimum noyddist teir at koma við einum útspæli um ein nýskipan.

Í einari ósakligari roynd at leypa øði í, so tekur Edmund Joensen so rívan til við beinleiðis lygnum, har hann m.a. førir fram, at Javnaðarflokkurin nú tekur undir við fullveldisætlanini. Hvar hevur Edmund Joensen sað meg ella Javnaðarflokkin skrivað slíkt, ella hvar hevur Edmund Joensen hoyrt meg ella Javnaðarflokkin sagt slíkt? Ongastaðni og tí er útsagnir hansara óverdugar og lítið álitisskapandi fyri ein fyrrverandi løgmann. Kann tað veruliga hugsast, at hesin maður byggir sínar niðurstøður á ein tankatosk hjá Sosialinum?

Munurin , sum nú er alt meira sjónligur, er, at meðan Javnaðarflokkurin veruliga tekur sítt egna uppskot um eina sjálvstýrislóg í fullum álvara, so er tað alt meira, sum bendur á, at Sambandsflokkurin við sínum nýskipanruppskoti, sum annars í stóran mun er ein avskrift av okkara sjálvstýrislóg, einans spælir fyri gallarínum. Teir meina einki við tað, og fáa teir makt, sum teir hava akt, so vita vit øll nú, at hann verður aftur tann sami fundamentalistiski Sambandsflokkurin, sum einki vil.

Javnaðarflokkurin torir á fund og inn í ein veruligan dialog við samgonguna bæði um hetta málið og onnur við. Vit hava okkara kjølfesti í einari livandi og framfýsnari skrá. Men vit vita eisini, hvar okkara mark gongur, so hvørki Edmund Joensen ella onnur skulu missa svøvnin av tí orsøk.

Vegna tann partin av Javnaðarflokkin, so hevur sjálvstýrisrákið altíð fingið størri ferð, enn fleiri halda ráðiligt, meðan hevur Sambandsflokkurin verið í samgongu, so hevur tað verið strangliga bannað bara at taka málið upp á tungu.

Føroya fólki, sum ikki ynskir fullveldi og loysing, síggja vit tað sum okkara skyldu, at vit brúka tíð og orku til at sannføra samgonguna um, at bróðurpartin av tí teir ynskja, tað kunnu vit fáa í einum felagsskapi við Danmark. Vit royna at sannføra teir um, at tað heldur ikki í hesum máli er neyðugt at fara yvir um ánna eftir vatni.

Um tað fer at eydnast, tað fer tíðin at vísa, men vit skylda okkara fólki og okkum sjálvum, at vit gera royndina.

Fullveldisætlanin krevur mótspæl, og tað er líkt til, at tað er bara Føroya Javnaðarflokkur, sum torir og kann geva teimum tað.

Jóannes Eidesgaard
floksformaður

Tey av Kamarinum á pall í Keypmannahavn

Vikuskiftið 4. og 5. februar fara tey av Kamarinum á pallin — í Danmark.

Tað er Nærvarp Okkara, - útvarpið fyri føroyingar á Keypmannahavnarleiðini, og Føroyahúsið í Keypmannahavn sum standa fyri hesum báðum dansikvøldum. Hetta er eitt stuðulstiltak til frama fyri ein kaðal, sum Nærvarpið, síðani tað varð stovna í 1984, hava havt ætlan at fáa lagdan inn í Føroyahúsið í Keypmannahavn.

Eftir at hava havt ein steðg frá 12.desembur til 11. január er Nærvarpið byrja at senda aftur. Steðgurin var tí at sendi-antennan brotnaði í ódnini, sum var fyrst í desembur mánaði í fjør, og tí studio, har nærvarpið sendir frá, skuldi flyta í nýggj hølir, uttan at útgerðin, sum er rættiliga gomul og næstan óbrúklig, varð útskift. Nærvarp Okkara hevur nýmótans útgerð, men manglar bara ein kaðal, sum er rættiliga kostnaðarmikil.

Bólkurin Tey av Kamarinum vard stovnaður í síðst í 50'unum / fyrst í 60'unum av syskinum Nikolinu, Ingolf, Áslakki, Margretu og Eyðbjørn Jakobsen.

Tey spældu nógv til dans í 60-70'unum, og vóru tey sera væl umtókt. Fleiri singleplátur eru komnar frá teimum, og ein einkult LP-pláta í 1984. Síðani hevur verið rættiliga stilt á Kamarinum, tó spæla 3 av limunum enn til dans í øðrum samanhangum.

Onkur einstøk dansikvøld hava tó verið seinni í 80'unum, - og tvey tiltøk síðsta og næstsíðsta ár í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Tey eldru ofta forsømd

Stigtakarirnir eru á einum máli um at tey tilkomnu og eldru í Keypmannahavn ofta verða forsømd, tá talan er um dansiltiltøk. Teir rokna ikki við at mong av fastbúgvandi føroyingunum í Danmark høvdu møguleikan at síggja tey, tá tey spældu á "Afturhvarv" — tiltøkunum í Sjónleikarhúsinum, men tað verður hervið gjørt nakað við

Við á ferðini úr Føroyum verða 8 fólk, og eru tey hesi:

Áslakkur Jakobsen
Nikolina Jakobsen
Eydbjørn Jakobsen
Ingolf Jakobsen
Jákup Jakobsen
Birgir Jakobsen
Árni Andreassen og
Joen Petur Andreassen

Stutt sagt verða hetta tvey góð dansikvøld, hvar góðskan og dansitónleikurin er í hásætinum, - og munnu vit ikki fara at hoyra løg sum Teir sigla um havið so víðja, Mamma mín, Tá ið mánin fer yvir fjalli og Blóman, tá Tey av Kamarinum fara at spæla til dans.

Kostnaðurin fyri hvørt dansikvøld er 100 krónur í forsølu og 120 krónur við dyrnar. Atgongumerki kunnu keypast í Føroyahúsinum frá komandi viku. Peningurin fer óskerdur til kaðalin, soleiðis at Nærvarp Okkara fær sent meira støðugt og við betri góðsku enn fyrr.

Nærvarp Okkara sendir á 91,4 MHz og 98,9 á hybridnetinum, og er at hoyra á Keypmannahavnsleiðini.
Sent verður fríggjakvøld kl. 20 — 21.30 við tónleiki
Og sunnudagar kl. 13 — 15 við innsløgum og tónleiki

Um tú flytir til Danmarkar og hevur hug at hjálpa til við nærvarps arbeiði, sum er ólønt, kanst tú ringja til Nærvarp Okkara á tel. 26 20 00 33.

SAVGR TEL 355 355

Soleiðis virka nýggju gjøldini

Føroya Tele hevur seinastu árini miðvíst arbeitt fram ímóti at fáa skapt tær neyðugu fortreytirnar fyri at lækka telefongjøldini í Føroyum.
Nú hevur Føroya Tele enn einaferð lækkað minuttgjøldini at galda frá 1. februar. Her eru nøkur dømi um, hvussu broytingarnar virka.

Smábrúkarin
Brúkar telefonina sjáldan. Tosar eina samrøðu um dagin og eina um kvøldið. Hvør samrøða er 3 minuttir.

Áðrenn	201,50
Aftaná	194,50
Sparing	6,70 kr
Sparing	3,33 %

Familjan
Miðalnýtsla: 10 samrøður um samdøgrið, av teimum 1/3 um dagin og 2/3 um kvøldið. Harafturat eru samrøður til fartelefon.

Áðrenn	563,95
Aftaná	503,40
Sparing	60,55 kr
Sparing	10,74 %

Miðalstóra virkið
Hevur 7 telefonir. Tær 7 telefonirnar hava hvør í miðal góðar 5 samrøður hvønn yrkadag, herav eisini uppringingar til fartelefon.

Áðrenn	2.858,00
Aftaná	2.439,00
Sparing	419,00 kr
Sparing	14,66 %

Fyri fólk, sum als ikki brúka telefonina, verður ein hækking upp á 26 kr. um mánaðin.
Omanfyri er bert roknað við uppringingum frá fastari telefon, og uttanlandssamtalur eru ikki tiknar við.

Talvan vísir gjøldini við mvg, sum tey verða frá 1. februar 2000.

	Verandi	1.februar 2000	Munur
Minuttgjald - fastnet dag	0,70	0,38	-45,7%
Minuttgjald - fastnet nátt	0,35	0,24	-31,4%
Minuttgjald - GSM dag	2,80	2,40	-14,3%
Minuttjgald - NMT dag	1,90	1,70	-10,5%
Minuttgjald - NMT nátt	0,95	0,90	-5,3%
Uppringingargjald	0,30	0,40	+33,3%
Mánaðargjald fastnet	89,00	115,00	+29,2%
Mánaðargjald ISDN	135,00	175,00	+29,6%
Mánaðargjald fartelefon	89,00	115,00	+29,2%

Legg til merkis, at tú sparir upp í 45% av minuttgjaldinum.

Síggj neyvaru útrokningarnar fyri roknistykkini omanfyri á: www.tele.fo

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo